## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 15 og 18 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin lot til andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt, men sunnudagin frískar hann vindin av suðri og stundum regn. Hitin millum 10 og 14 stig,

Úr útlegd:

# Áhugaverd og hugtakandi framsýning



**Serliga framsýningin hjá Føroya Fornminnisavnið, Úr útlegd, lat upp um vikuskiftið. Við á framsýningini eru millum annað teir so nógv umtalaðu kirkjubøstólarnir saman við nógvum øðrum spennandi forngripum**

FRAMSÝNING
*Ingrid Bjarnastein*

Ólavsøkan er farin afturum bak, og nógvir av gestunum hava millum annað leitað sær niðan á Føroya Fornminnissavn, har framsýningin Úr útlegd er opin.

Longu tíðliga fyrrapartin leygardagin vóru nógv fólk, sum nýttu høvið at koma á gátt hjá fornminnissavninum. Teir so víðagitnu kirkjubøstólarnir, sum nú hava funnið vegin aftur til Føroya, vóru saman við øðrum forvitnisligum lutum sýndir fram um ólavsøkuna.

Uppi í Hoyvík vóru fólk í øllum aldri. Heilt smá børn og heilt tilkomin fólk eisini. Dempaða ljósið gav ein heilt serligan stemning í niðaru hæddini í savninum.

Og har stóðu teir. Kirkjubøstólarnir. Saman við einum bispastóli høvdu kirkjubøstólarnir fingið nógv tað mesta plássið í framsýningini, men tað var kanska ikki so løgið hóast alt, tí hetta vóru lutirnir, ið tóku nógv mest pláss.

Men nógv annað stuttligt og forvitnisligt var at síggja. Nevnast kann eitt talvborð við fólki, sum varð sent niður til Danmarkar av Jóannesi Paturson bónda (1866 – 1946), eitt tjóður úr rossafaksi, krúthorn, myntir, ein messuakul úr Fámjin, sum er gjørdur í Italia í 1500 talinum og nógv annað.

Nógvir húsarhaldslutir, okkurt hendinga klæðnaplagg, barnastólur, stakkprýði… ja, listin er nærum óendaligur.

Framsýningin er fjølbroytt og spennandi, so um hugur er til tess, so er serstaka framsýningin hjá Fornminnissavninum verd eina vitjan.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 4 |
| Nuuk | 6 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | 11 |
| Halifax | 20 |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 18 |
| Tromsø | 12 |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 19 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 19 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 16 |
| Warzawa | 18 |
| Kiev | 18 |
| Bukarest | 18 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 27 |
| Athen | 31 |
| Malta | 27 |
| Tunis | 29 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 16 |
| New York | 23 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 25 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1014 hPa yvir Írska Havinum fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið haðani verður tætt eystanfyri Føroyar mikudagin.




Lágtrýstið yvir Onglandi fer í útsynning. Hátrýstið yvir Norska Havinum stendur mestsum í stað og gevur væntandi góðveður seinni í vikuni.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 29/07 kl. 06[00]– 30/07 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 11,7°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 29/07 kl. 06[00]– 30/07 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 31,2 mm




- Bókhald
- Ársroknskap
- Fíggjarætlan
- Grannskoðan
- Fíggjarráðgeving

**Tosið við okkum!**

Føroyabók
Skrásett Grannskoðaravirki
Vágstún 2 · Postsmoga 144 · 700 Klaksvík
Tel 455522 · Far 217505 · Fax 457705

## VESTFALLSKYRRINDI

24. juli: Fullmáni
30. juli: Mánin longst frá jørðini
1. aug.: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 31. juli | 00.09 | 12.28 | 11.28 | — | 11.43 | — | 02.09 | 14.28 | 03.09 | 15.28 | 10.43 | 23.15 | 09.43 | 22.15 | 00.24 | 12.43 | 01.24 | 13.43 | — | 12.13 | 01.09 | 13.28 |
| 1. aug | 01.00 | 13.31 | 00.00 | 12.31 | 00.15 | 12.46 | 03.00 | 15.31 | 04.00 | 16.31 | 11.46 | — | 10.46 | 23.18 | 01.15 | 13.46 | 02.15 | 14.46 | 00.45 | 13.16 | 02.00 | 14.31 |
| 2. aug | 02.03 | 14.36 | 01.03 | 13.36 | 01.18 | 13.51 | 04.03 | 16.36 | 05.03 | 17.36 | 00.18 | 12.51 | 11.51 | — | 02.18 | 14.51 | 03.18 | 15.51 | 01.48 | 14.21 | 03.03 | 15.36 |
| 3. aug | 02.56 | 15.17 | 01.56 | 14.17 | 02.11 | 14.32 | 04.56 | 17.17 | 05.56 | 18.17 | 01.11 | 13.32 | 00.11 | 12.32 | 03.11 | 15.32 | 04.11 | 16.32 | 02.41 | 15.02 | 03.56 | 16.17 |

5 707265 100036 >